

# STØRSTI HANDILS-MIÐDEPILIN Í EUROPA

## Í Gateshead nær við Newcastle liggur handilsmiðdepilin "Metro Centre", sum er tann størsti handilsmiðdepilin í Europa

Bert ein stuttan tein úr Newcastle ber til at uppliva tann kenda handilsmiðdepilin "Metro Centre", sum ligur í býnum Gateshead. Metro Centre bjóðar sínum viðskiftafólkum nógvar møguleikar, og handilsmiðdepilin lagar seg alla tíðina eftir tørvinum hjá viðskiftafólkunum. Fylgt verður væl við hvat hendir í líknandi handilsmiðdeplum í Europa, fyri alla tíðina at kunna verða við í fremstu røð. Og talið av vitjandi er vaksandi fyri hvørt ár, sum gongur. Talan er um eitt trygt, reint og vinarligt handilsumhvørvið, har tað ikki er finst tann lutur, sum ikki kann keypast í teimum mongu handlinum í handilsmiðdeplinum.

Í sjálvum Newcastle býi er eisini ógvuliga høggligt at fara á innkeypsferð. Tað eru fleiri handilsmiðdeplar í miðbýnum í Newcastle, har klædnahandlarnir hava tann seinasta mótan á søluhillunum. Tann størsti handilsmiðdepilin í sjálvum Newcastle býi er "Eldon Square Shopping Centre". Aðrir kendir handlar í Eldon Square Shopping Centre eru m.a. "Marks & Spencer", "John Lewis" og "Fenwick". Nógvar bussleiðir steðga tætt við hendan handilsmiðdepilin, sum verður mettur at verða serliga væl fyri, tá talan er um tað nýggjasta innan klædnamóta. Ein kend handilsgøta í Newcastle er Northumberland Street. Her er talan um handlar fyri tann størra pengapungin. Northumberland Street hevur dýrastu handlarnar í Onglandi, sum eru at finna uttanfyri høvuðsstaðin, London. Newcastle hevur sostatt handlar, ið hóska til einhvønn tørv.